# ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

**Hevur tú ein tíðindastubba, ella veitst tú um eina ítróttarhending, sum eftir tínum tykki átti at verið í blaðnum, ber altið til at seta teg í samband við okkum á tlf: 311820**

# Ivasamt við Atlantsrisanum

*Í løtuni er ógreitt, um kappingin um at gerast atlantsrisi verður fyriskipað í 2000, tí enn hevur Regin Vágadal ikki fingið svar frá Sjónvarpinum, hvørt teir eru áhugaðir í at stuðla kappingini. Er SvF áhugað í hesum, er eingin ivi um, at kappingin verður veruleiki*



*Regin Vágadal hevur tikið sær av løttum seinastu tíðina, men í vikuni fór hann aftur undir venjingina. Fleiri spennandi kappingar standa á skránni, men enn er ikki avgjørt, um kappingin um Atlantsrisan verður fyriskipað í ár*
**Savnsmynd**

JÁKUP MØRK

Seinastu tvey árini hevur Regin Vágadal skipað fyri Kappingini, Atlantic Giant, har sterkir menn úr øllum heiminum koma til klettar okkara at royna brøgd av ymsum slag.

Talan er sum kunnugt um fleiri ymsar kappingar, har luttakararnir skulu lyfta steinar, syfta kaggar, ganga við tungum vektum o.s.fr. Stig verða givin fyri hvørja kapping sær, og at enda verður ein vinnari funnin.

### Ivasamt

Seinasta ár stóð Regin seg sera væl, og flestu føroyingar mundu fylgja væl við, tá útvarpið segði frá, hvussu hann stóð seg í ymsu kappingunum, og nakrar mánaðar eftir, at kappingin var hildin, høvdu vit so eisini høvi til at síggja hetta í sjónvarpinum, við tað at SvF hevði tikið alla kappingina upp.

Júst SvF er stóri spurningurin, nú Regin er farin at hugsa um, hvørt hann skal skipa fyri atlantsrisanum enn eina ferð. Regin greiðir frá, at einasti møguleikin hann hevur, at skipa fyri slíkari kapping, er, um hann fær nóg mikið av stuðulskrónum í kassan, og her er Sjónvarpið ein týðandi partur.

Sum dømi nevnir hann, at teir íðkarar, sum hann dystast ímóti, fáa runt roknað 10 ferðir so nógvar stuðulskrónur, og tískil er sera torført hjá Regini at fáa tað fíggjarliga at hanga saman.

Eisini nevnir hann, at eingin almennur stuðul verður latin til slíkt tiltak, hóast hetta má metast at vera ein góð reklama fyri Føroyar.

Tá vit spyrja hann, um luttakararnir frá seinasti kapping eru áhugaðir í at koma aftur henda vegin, svarar hann, at tað er tann minsti trupulleikin. Fæst fíggingin upp á pláss, er púra vist, at kappingin verður hildin.

Sostatt situr Regin nú og bíðar eftir svari frá SvF, hvørt teir vilja vera við til eina slíka kapping aftur í ár. Trupulleikin er helst eisini, at fíggjarligu karmarnir hjá Sjónvarpinum eru sera treingir, og er tað tískil kanska ein spurningur, um teir hava orku til at fara undir eitt slíkt tiltak.

Hinvegin er ikki óhugsandi, at SvF við at selja sendingarnar til útlendskar sjónvarpsrásir, kann forvinna eitt sindur av peningi, og kundi Atlantic Giant sostatt verið eitt ískoyti, ístaðin fyri ein byrða, til dagliga raksturin hjá Sjónvarpinum.

### Farin undir venjingina

Regin er annars júst byrjaður at venja aftur, eftir at hann fyri fyrstu ferð í fleiri ár hevur tikið sær frí í hálvan annan mánað.

Yrkið sum sterkur maður, er jú rættuliga strævið fyri likamið, men hóast hetta, so greiður Regin frá, at hetta er fyrsti veruligi steðgur hansara í fleiri ár.

Undanfarin ár hevur hann onkuntíð hildi frí í eina ella tvær vikur, men ongantíð so leingi sum hesu ferð, og sjálvur heldur hann eisini, at tað hevur verið gott at kunna tikist við alt møguligt annað seinastu tíðina.

Tá hann sigur, at hann hevur hildið frí, so meinar hann tað eisini, tí hóast hann fyri stuttum er fluttur inn í nýggj hús, so hevur hann ikki flutt somikið sum ein einasta stein í garðinum hesa seinastu tíðina. Ístaðin hevur hann nýtt tíðina til at takast við leiklutin sum familjupápi, og tað man nú heldur ikki vera so galið.

Nú er gerandisdagurin tó komin aftur, og at hann hevur nakað at miða fram ímóti er lítið at ivast í.

### Nógv á skránni

Tað er nevnliga soleiðis, at Føroya sterkasti maður hevur rættuliga nógv á skránni komandi árið, hóast tað enn ikki er fastlagt, hvørjum kappingum hann fer at luttaka í hetta árið.

Fyrsta, sum stendur á skránni, er ein kapping í Finnlandi, sum verður í mars mánaði, og møguliga verður Regin at síggja millum luttakararnar í hesi kapping, men enn hevur hann so ikki avgjørt, um hetta verður veruleiki.

Sæð við føroyskum eygum, er mest spennandi kappingin helst tann, sum skal fara fram í Ungarn í mai mánaði.

Hetta er nevnliga ein sonevnd liðkapping, har luttakararnir eru saman tveir og tveir. Undanfarin ár hevur tað verið soleiðis, at Regin hevur umboðað heimlandið saman við onkrum útlendingi, men í ár er møguleiki fyri at føroya næst sterkasti maður, Sámal Johannes Hansen, verður saman við Regini í hesi kapping. Í hvussu er vil Regin ikki útiloka hesum, men hann leggur samstundis dent á, at enn er einki fastlagt hesum viðvíkjandi.

Aðrar kappingar, sum møguliga eru á skránni, eru m.a. ein kapping, sum verður í USA í juli, umframt at ein kapping skal vera í Kina í september mánaði. Annars eru ikki so nógvar kappingar lagdar í fasta legu enn, men frá Regini frætta vit, at hann fær upplýsingar um ymsar kappingar leypandi, og so má man bara taka tað, sum tað kemur.

Í august mánaði verður so kappingin um at gerast heimsins sterkasti maður á skránni, og hóast tað enn ikki er greitt, hvar henda kapping verður, so man Regin helst fara at teljast millum luttakararnar í hesi kapping.

Tað var annars júst í hesi kapping, at Regin fekk sítt veruliga gjøgnumbrot, tá hann millum allar hinar risarnar púra óvæntað megnaði at vinna sær pláss í finalubólkinum.

Sum vera man, var hetta eitt avrik, sum flest allir føroyingar vóru erpnir av.

Framman undan hevði hann vunnið sær heitið sum Føroya Sterkasti maður, og eisini hevði hann staðið seg sera væl í eini kapping í Skotlandi, men at hann skuldi standa seg somikið væl á Mauritius kom óvart á tey flestu.

### Avgjørt í næstum

Beint fyri evstamark í gjár tosaðu vit við Trónd Djurhuus, sjónvarpsstjóra, sum tá sat og fyrireikaði seg til fund við júst Regin Vágadal.

Sum vera man, so kundi hann ikki staðfesta, hvørt Sjónvarpið fór at gera sendingar um Atlantsrisan, við tað at hetta var tað, sum fundast skuldi um.

Tróndur segði tó, at í løtuni eru útlitini fyri hesum ikki av teimum bestu, við tað at fíggjarliga byrðan, sum Sjónvarpið hevur av tiltakinum er ov stór.

Flestum kunnugt, so hevur Sjónvarpið sera trong fíggjarlig kor, og tískil kann tað eisini vera heldur møtumikið at fara undir slíkt tiltak.

Sjónvarpsstjórin legði tó afturat, at hetta als ikki skal skiljast soleiðis, at Regin hevur verið órímuligur at samstarvast við, men at hann tvørtur ímóti hevur verið sera lagaligur at fingist við.

-Trupulleikin er bara tann, at Sjónvarpið ber ein ov stóran fjølmiðlakostnað í hesum sambandi, og at vit tískil ikki hava fíggjarligar umstøður til at stuðla tiltakinum undir somu fortreytum, sigur Tróndur Djurhuus.

Seinasta ár keypti sjónvarpsstøðin, Eurosport, sendingarnar frá Sjónvarpi Føroya, men sum skilst, so hevur hetta ikki verið nóg mikið til at rinda framleiðslukostnaðin av sendingini.

Vónandi kann ein loysn tó finnast á hesum spurningi, soleiðis at føroyingar eisini hetta árið kunnu síggja sterku menninar, um hesir fara at sýna styrki sína ymsastaðni í landinum.





Miðvísa venjaraútbúgvingin í Noreg hevur stuðlað upp undir góðu avrikini hjá landsliði teirra
**Tilvildarlig mynd**

# Læra frá norðmonnum

*28. og 29. januar skipar Fótbóltssambandi fyri venjaraskeiði, sum er ætlað føroysku venjarunum, sum partvíst eisini er ætlað leiðarunum í ymsu feløgunum*

JÁKUP MØRK

Skeiðið, sum er ætlað verandi venjarum, verður hildið í hølunum hjá Tryggingarsambandinum inni í Runavíkini.

Skeiðleiðari verður norðmaðurin, Bjørn Hansen, sum dagliga er talentvenjari hjá norska stórfelagnum, Rosenborg, umframt at hann er venjari hjá norska U-21 landsliðnum.

Júst Rosenborg er eitt felag, sum hevur tikið seg fram í stórum seinastu árini, og í løtuni royna teir seg í Champions-League, har tað er eydnast teimum at koma víðari frá fyrra bólkaspælinum.

### Stór framgongd

Lagt verður til brots fríggjakvøldið, og leygardagurin verðru so allur avsettur til skeið, fyrilestrar og venjingar.

Seinastu árini hevur nógv verið tosað og gitt um, hvør atvoldin til framgongdina og styrkina hjá Rosenborg hevur verið. Fyrr vóru tað serliga Brøndby og IFK Gøteborg, sum umboðaðu Norðanlondini í altjóða høpi, men seinastu árini er Rosnborg farið langt fram við teimum báðum.

Líkt er tí til, at bæði venjarar og ítróttarleiðarar í Føroyum kunnu læra nógv av arbeiðsháttinum hjá Rosenborg, og tí hevur fótbóltssambandið gjørt av, at bæði venjarnar og umboð fyri feløgini kunnu vera við á skeiðnum.

Tann parturin, sum viðvíkur umboðunum hjá felagnum er ein fundur um »Rosenborgs Filosofi«, sum verður fríggjakvøldið kl. 20.00, meðan skeiðið fyri venjarar fevnir um bæði fríggja- og leygardagin.

Harumframt fevnir skeiðið eisini um venjingarhættirnar hjá norska stórfelagnum, og fevir hesin partur um bæði ástøðiliga og praktiska undirvísing.

Sum nevnt, so er Bjørn Hansen eisini venjari hjá norska U21 landsliðnum, og sigur hetta ikki so lítið um tær dygdir, sum venjarin hevur.

Tað er jú ikki bert Rosenborg, sum hevur havt stóra framgongd seinastu árini. Norskur landsliðsfótbóltur hevur eisini tikið seg nógv fram, og hóast Drillo (Egil Olsen) hevur fingið stóran part av heiðrinum fyri hetta, so hevur hann sjálvsagt ikki verið einsamallur um arbeiðið.

Frægu úrslitini seinastu tíðina eru eitt úrslit av langsiktaðari og miðvísari venjing, sum er løgd til rættis fyri fleiri árum síðani, so ivaleyst kunnu føroysku luttakararnir læra eitt hvørt frá norska starvsfelaga teirra, sum síðani kann verða føroyskum fótbólti at frama.

Skeiðið er ókeypis, og skal FSF hava boð um luttøku í seinasta lagi hósdagin 20. januar.

# Evnaríkur unglingi

*Seinastu tíðina hevur 15 ára Kenneth Danielsen úr Gøtu rættuliga gjørt vart seg í Danmark, við tað at hann hóast sín rættuliga unga aldur, hevur koyrt seg upp millum fremstu moto-cross koyrararnar á Sælandi*

JÁKUP MØRK

Seinastu tíðina hevur nógv verið at hoyrt um føroyingar, sum hava gjørt vart við seg uttanlanda, tá teir hava staðið seg væl í onkrari ítróttargrein.

Ein, sum vit tó ikki hava hoyrt so nógv um, er 15 ára gamli gøtudrongurin, Kenneth Danielsen, sum seinastu árini hevur roynt seg sum moto-cross koyrari í Danmark.

### Millum teir yngstu

At byrja við royndi hann seg í sonevnda 80 flokkinum. 80 flokkurin merkir, at súkklurnar, sum koyrt verður á, hava ein motor, sum er 80 rúmsentimetrar ella ccm.

Eftir at hann hevði staðið seg avbera væl í hesum bólki, flutti hann seinast vetur upp 125 flokkin, har tað vanliga eru koyrarar, sum hava staðið seg væl í fleiri ár, sum fáa møguleikan.

1999 var sostatt fyrsta árið, at Kenneth royndi seg í hesum flokki, og ikki kann sigast annað enn, at hann hevur staðið seg sera væl. Enn hevur hann ikki koyrt í DM-kappingini, men hevur hann ístaðin roynt seg á Sælandi, har hann gjørdist nr. 12 av 42 koyrarum.

Til samanberingar kann nevnast, at vinnarin í hesum bólki hevur koyrt moto-cross í 5 ár, og har umframt skal sigast, at Kenneth er milllum yngstu luttakarin í bólkinum.

Hetta hava danir eisini lagt til merkis, og fyri góða avrik sítt, fekk hann tískil ídnaðarprógv frá felagi sínum, Svebølle Moto-Cross Club.

Nevnast kann eisini, at við tað at Kenneth er nógv yngri enn flestu av mótstøðumonnunum, hevur eisini verið neyðugt at broyta eitt sindur upp á súkklu hansara. Hesar eru vanligar gjørdar soleiðis, at tær skulu bera ein koyrara upp á uml. 70 kilo. Kenneth vigar tó bert eini 50 kilo, og tí er ymiskt á súkkluni broytt, so hon riggar betri til lítla kropp hansara.

### Leggur nógv fyri

Frægu úrslitini hava eisini gjørt sítt til, at Kenneth nú ætlar at seta nógv fyri, og verður tí lagt nógv meira fyri nú, enn talan var um seinasta ár.

Fyri stuttum hevur hann verið í Belgia, har hann saman við liðfeløgunum hevur verið á venjingarlegu, og harumframt er eisini borið soleiðis í bandi, at Kenneth nú hevur egnan venjara.

Vanliga er tað annars soleiðis, at meginparturin av venjingini gongur fyri seg á tann hátt, at koyrararnir so at siga læra seg sjálvan, hóast teir sjálvsagt eisini fáa góð ráð av ymsum slag. Nú hevur Kenneth tó fingið egnan venjara, og er venjarin eingin annar enn Jesper K. Jørgensen, sum í 1998 varð europameistari í 250 flokkinum.

Í 1999 fekk hann ikki vart heitið, orsakað av skaða, men einki er at ivast í, at Kenneth við hesum hevur fingið ein sera dugnaligan lærumeistara, sum hevur nógv at geva frá sær.

At ein somikið frægur maður, hevur hug at fara undir hetta, ber eisini boð um, at tað búgva góð evni í unga gøtumanninum.

Jesper fær tó ikki hugt Kenneth hvønn dag, so ístaðin verður venjingin skipað á tann hátt, at teir báðir eru saman einar 25 ferðir um árið, har tað so verður vant út í eitt frá tíðliga á morgni.

### Kostnaðarmikið

Sum vera man, so er talan ikki um nakra bíliga ítrótt. Sjálv súkklan og tann trygdarútgerð, sum annars verður nýtt, kosta sjálvandi eina rúgvu av peningi, men harumframt er eisini rættuliga nógv av viðlíkahaldi.

Sum dømi kann nevnast, at dekk mugu skiftast áðrenn hvørja kapping, og kosta hesi vanliga um 500 kr. Harumframt er eisini slit á stoytdoyvarar og líknandi, so alt í alt kann tað vera rættuliga skjótt, at ein 1000 krónu seðil er nýttur.

Enn hevur tað so ikki eydnast Kenneth at finna nakrar stuðlar, men sjálvur vónar hann, at hetta fer at bera til, soleiðis at hann í framtíðini kann gerast enn betur í hesari ítrótt.

Tíðina hevur hann í hvussu so er fyri sær, og við røttu venjingarumstøðunum kann hann ivaleyst koma heilt langt, hesin ungi gøtudrongurin.



Kenneth sæst her á súkkluni, sum hann seinasta árið hevur nýtt í kappingini um at gerast besti koyrarin á Sælandi

# Svimjararnir stóðu seg væl

*Føroysku svimjigenturnar, sum í vikuskiftinum luttóku í fleirtjóða kapping í Hálandi stóðu seg sera væl, og høvdu 4 heiðursmerki við sær á heimferðini*

JÁKUP MØRK

Seinasta vikuskifti vóru Ester Gaard Hansen og Heidi Andreasen í Hálandi, har tær báðar luttóku í stóru kappingini, Double Dutch Open.

Við á ferðini var eisini venjari teirra, fyrrverandi gullfiskurin, Katrin Johansen, sum í síni tíð førdi mong heiðursmerki heim til Føroya.

### Góð úrslit

Fleiri enn 200 svimjarar úr átta ymsum tjóðum luttóku í kappingini, men hetta merkti ikki, at uppgávan gjørdist ov møtumikil hjá føroysku svimjarunum.

Báðar luttóku tær í 6 ymsum kappingum hvør, og tá avtornaði, høvdu tær báðar staðið seg sera væl.

Ester Gaard Hansen vann silvurmerki í 200 metra blandaðari svimjing, og harumframt vann hon bronsumerki í bæði 400 metra fríog 100 metra bringusvimjing.

Heidi gjørdi eisini um seg í kappingini, og megnaði hon at vinna sær bronsumerki á teininum, 100 metra ryggsvimjing.

### Til Sydney

Kappingin í Hálandi var liður í fyrireikingunum til Paraolympisku leikirnar, sum verða hildnir í Sydney í heyst.

Føroysku svimjigenturnar hava longu tryggjað sær luttøku á leikunum, tí higartil hava tær megnað at svomið undir kravtíðunum á fleiri av teimum teinum, sum tá standa á skránni.